# Øll ynskja gott veður

**Fríggjadagin eftir vígsluna hjá Fríðriki krúnprinsi og Mary Elisabeth Donaldson í Københavns Domkirke fer brúðarparið í hestavogni ígjøgnum Keyp-mannahavnar gøtur til Amalienborg. Øll vóna, at veðurgudarnir verða blíðir hendan dagin, so at brúðarparið kann heilsa fólkinum í opnum hestavogni**

KONGALIGT BRÚDLEYP
*Stefan í Skorini*

Festligheitirnar í sambandi við kongaliga brúdleypið hava vart meira enn eina viku. Startskotið til brúdleypið var tann 5. mai, tá tann danska verjan hevði framsýning í Keypmannahavn fyri kongafamiljuni og almenninginum. Síðani hevur nógv virksemi verið kring kongshúsið hvønn dag við konsert, kappsigling, døgurðum, veitslum og einum ótali av móttøkum.

Danir vilja ikki gera tað sama mistakið sum norska kongshúsið gjørdi fyri nøkrum árum síðani, tá krúnprinsurin giftist. Norðmenn siga, at ov lítið varð gjørt burturúr brúdleypinum, og hetta hevði við sær, at útlendskir fjølmiðlar ikki góvu brúdleypinum nóg stóran ans. Tí hevur kongshúsið lagt tiltøkini yvir eitt longri tíðarskeið. Endabresturin verður í dag.



*Veðurmenninir lova turt veður fríggjadagin seinnapart, tá hestavognurin fer úr kirkjuni*

## Veðrið

Veðurmenninir lova turt veður fríggjadagin seinnapart, tá hestavognurin fer úr kirkjuni. Men nýggjastu meldingarnar siga, at tað verður regn út á kvøldið. So er at vóna, at tað verður turt inntil brúðarparið aftur er komið undir tak. Fólk í túsundatali verða væntandi í gøtunum fríggjadagin, um tað er gott veður ella ikki.

Tíðarætlanin sigur, at vígslan byrjar kl. 15 føroyska tíð í Københavns Domkirke, har 800 gestir eru innbodnir. Tað er Erik Norman Svendsen, bispur, ið skal standa fyri vígsluni, og hann fer eisini at halda brúdleypstaluna. Ein tíma seinni fer brúðarparið í hestavognin, sum skal føra tey ígjøgnum gøturnar frá Dómkirkjuni, eisini kallað Vor Frue Kirke, til Amalienborg.

Tað veldst um veðrið, hvat slag av hestavogni brúðarparið fer at koyra í. Um tað verður gott veður og turt, fer brúðarparið at koyra í einum opnum hestavogni av slagnum Barouche. Hesin vognurin varð gjørdur Berlin í 1906. Margreta Drotning nýtti hendan sama vognin, tá hon giftist Hendriki prinsi í 1967.

Um veðrið ikki er til vildar, verður koyrt í gullvogninum, sum er lagdur við 24 karat gulli. Hesin vognurin er frá 1840.

Ábyrgdarhavandi fyri trygdini hjá brúðarparinum vildi heldur, at tað koyrdi í einum afturlatnum vogni, men kongshúsið vildi heldur hava ein opnan vogn, um tað á nakran hátt bar til.

Hestavognurin við brúðarparinum fer at koyra frá Vor Frue Kirke eftir Nørre Voldgade og H.C. Andersens Boulevard til Ráðhúsplássið. Síðani verður hildið fram omaneftir eftir Strøgnum til Kongens Nytorv og framvið tí Kongaliga Teatrinum. Koyrt verður eftir Bredgade og til Amalienborg slot.

## Stórt fylgi

Tað verður eitt stórt fylgi, sum fer at ríða frá Dómkirkjuni og gjøgnum gøturnar. Tað verður Garderhusregimentet, sum fer at eskortera krúnprinsin og brúðrina til Amalienborg. Tilsamans 48 menn á hestbaki fara at fylgja parinum.

Kl. 16.40 fer brúðarparið at veitra til fjøldina av balkongini á palænum hjá Christiani VII, sum er ein partur av Amalienborg. Nakað seinni verður koyrt til Fredensborg, har veitslan skal standa. Hesuferð eru tað seksti reiðmenn úr ríðifeløgum á Norðursælandi, sum fara at fylgja parinum á leiðini.

Klokkan 20 danska tíð verður so døgurðin á Fredensborg slotti, har løgmaður Jóannes Eidesgaard og løgtingsformaður Edmund Joensen vera til staðar við frú.

Brúdleypsdøgurðin verður í einum 1400 fermetra stórum tjaldi, sum er sett uppí urtagarðinum aftan fyri Fredensborg, har teir 400 gestirnir skulu eta. Aftaná skal brúðarparið dansa brúðarvalsin í Kuppelsalinum, eins og bæði Joachim prinsur og Margreta drotning hava gjørt frammanundan. Møguliga fáa løgmaður og løgtingsformaðurin høvi at fáa ein dans við tí vøkru brúðrini.





Fiska tær eina spennandi gávu á føðingardegnum og fá eina ballón frá Bassa

Bassi vitjar á deildum okkara hesar dagar

**Á Sandi**
Mánadagin 17. mai 14.00–16.00

**Í miðbýnum, Tórshavn**
Týsdagin 18. mai 12.00–16.00

**Í Hvalba**
Mikudagin 19. mai 14.00–15.00

**Á Tvøroyri**
Mikudagin 19. mai 14.00–16.00

**Á Eiði**
Mánadagin 24. mai 12.00–13.30

**Við Norðskála**
Mánadagin 24. mai 14.00–16.00

**Í Kollafirði**
Mánadagin 24. mai 14.00–16.00

**Við Gøtugjógv**
Týsdagin 25. mai 12.00–13.30

**Í Fuglafirði**
Týsdagin 25. mai 14.00–16.00

**Á Strondum**
Mikudagin 26. mai 12.00–13.30

**Í Runavík**
Mikudagin 26. mai 14.00–16.00

**Í Sørvági**
Hósdagin 27. mai 12.00–13.30

**Í Miðvági**
Hósdagin 27. mai 14.00–16.00

**Í Vestmanna**
Fríggjadagin 28. mai 14.00–16.00

FØROYA SPARIKASSI

REPROZ




# Sethús halda prísirnar

**Serliga í Havn halda sethúsini somu søluprísir, sum í fjør, vísir uppgerð, sum Sparikassin hevur gjørt**

SETHÚSASØLA
*tíðindaskriv*

– Tey feskastu hagtølini yvir sethúsasølur í Føroyum vísa í stuttum, at húsaprísirnir eru á leið á sama stigi sum somu tíð í fjør. Tað er greitt, hóast ábendingar og prát hava verið um búskaparliga afturgongd.

– Nýggju hagtølini fevna um handilin við sethúsum í fyrsta ársfjórðingi í ár. Uppgerðin, sum Sparikassin hevur gjørt, vísir, at sethúsaprísirnir flyta seg ikki nevnivert.

Prísurin á sethúsum í høvuðsstaðnun er kvinkaður uppeftir, men broytingin er lítil. Fyrsta ársfjórðing í 2003 var miðalprísurin á einum húsum í Havn 1.339.909 krónur, og uppgerðin fyrsta ársfjórðing í ár vísir, at prísurin er 1.390.231.

Bæði í størri og minni bygdum er prísurin farin nakað niður. Í størri bygdum var miðalprísurin fyri einum ári síðani 762.647 krónur, men nú er hann 558.030 krónur. Í smærri bygdum var miðalprísurin tann fyrsta ársfjórðingin í 2003 á 888.333 krónum, men fyrsta ársfjórðing í 2004 var prísurin 690.882 krónur.

Sethúsahagtølini vísa eisini, at 40 hús vórðu handlað fyrsta ársfjórðing í 2004, og tað er júst hitt sama sum tilsvarandi tíðarskeið árið fyri.

Alt árið í 2003 skiftu 172 hús eigara, meðan talið fyri 2002 var 188.

Tølini í uppgerðini hjá Sparikassanum umboða prísin á miðalsethúsum í fríum handli. Tey stava frá Tinglýsingini og eru viðgjørd á slíkan hátt, at tey geva eina mynd av kostnaðinum, sum vanlig sethús verða keypt og seld fyri.



*1.390.231 kr. Tað er miðalprísurin fyri eini sethús í høvuðsstaðnum*


VARPIÐ
Skráir og ummælir
16 síður
Hvønn fríggjadag

SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

WWW.SMYRIL-LINE.COM

Manning til NORRÖNU

**Hervið verður søkt eftir manning til Norrönu.**

Talan er um øll størv innan catering:

- móttøkufólk
- barrfólk
- tænarar
- kokkar
- reingerðarfólk
- bakarar
- fólk í kafeteria
- goymslufólk
- fólk til handlarnar umborð



Smyril Line sóknast eftir fólki við royndum á høgum, altjóða tænastustigi. Tað er eitt krav, at umsøkjararnir duga væl enskt, hava góð samstarvsevni og duga at arbeiða undir trýsti uttan at missa yvirlitið.

**Heilsuprógv fyri sjófólk krevst**
(ikki eldri enn 2 ár).

Tað er ein fyrimunur at hava trygdarskeið
(ikki eldri enn 5 ár).

Smyril Line bjóðar støv í einum umhvørvi við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning.

Umsóknir og CV skulu sendast til:

**Smyril Line**
**Manningardeildin**
**Jónas Broncks gøta 37**
**Postboks 370**
**FO-110 Tórshavn**

Ella við telduposti til:

**technical@smyril-line.fo**

SMYRIL LINE

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

WWW.SMYRIL-LINE.COM

Harmonikutúrurin
á Noregsferðini 6. til 8. september

Prísur fyri hvønn
úr 800,-



**Vælumtókti harmonikutúrurin** við Norrönu verður í ár 6. – 8. september, har Fimmbogi Lisberg og Pauli Jacobsen skipa fyri.

Fleiri góð harmonikulið luttaka á túrinum.

Liggið ikki sjóvarfallið av tykkum, men bíleggið ferðina í góðari tíð.

PRÍSIR

| | |
|---|---|
| Couchettir | 800,- |
| 4 koyggjukamar v. wc/bað innv. | 900,- |
| 4 koyggjukamar v. wc/bað útv. | 1.000,- |
| 3 koyggjukamar v. wc/bað innv. | 1.200,- |
| 3 koyggjukamar v. wc/bað útv. | 1.400,- |
| 2 koyggjukamar v. wc/bað útv. | 1.700,- |

Prísurin fatar um ferð fram og aftur á farleiðini Tórshavn-Bergen (matur og drykkjuvørur ikki íroknað).

SMYRIL LINE